# Helgi aftur í gaggurnar

**FÓTBÓLTUR** Eftir ein steðg frá fótbólti á hægsta stigi, fer 32 ára gamli rituvíkingurin, Helgi L. Petersen, aftur at royna seg í barndómsfelagnum, NSÍ

Hilmar Jan Hansen

Síðstu ferð, Helgi L. Petersen spældi í bestu føroysku fótbóltsdeildini, var tann 24. august í 2008, tá hann spældi við ÍF. Síðani hevur talan bara verið um nakrar dystir í næstbestu deildini, men nú hann hevur skrivað undir ein eitt árs sáttmála við NSÍ, kundi verið líkt til eitt »come-back« í bestu deildini.

Í øllum førum fegnast tey í NSÍ um, at rituvíkingurin aftur er at finna á heimabeitinum: – Vit fegnast um at hava fingið knýtt Helga at hópinum, tí við sínum drúgvu royndum kemur hann ivaleyst at fáa stóran týdning fyri hópin – bæði á vøllinum og uttanfyri, sigur formaðurin í NSÍ, Sølvi Reinert Hansen.

Helgi, sum sambært faroesoccer.com hevur spælt 162 dystir og skotið 52 mál í bestu deildini, hevur millum ár og dag eisini roynt seg í øðrum feløgum enn NSÍ, eitt nú GÍ, B36 og ÍF. Tá hann í 2001 spældi við GÍ, skjeyt hann heili 24 mál í 24 dystum.

Ein stóran part av kappingarárinum 2009 var hann venjari hjá FC Hoyvík, men annars hevur hann síðstu tvey árini verið hollur fótbóltsviðmerkjari hjá Rás 2 og Sosialinum.

# Ensku odda-liðini vunnu

**PREMIER LEAGUE** Wayne Rooney rakti aftur málið, Chelsea skoraði fýra mál uttan Fernando Torres, og Arsenal vendi hóttandi tapi

Tróndur Arge

Fýra dystir vóru í ensku Premier League í gjárkvøldið, har tey trý oddaliðini, sum vóru á vøllinum, øll vunnu sínar dystir.

Á Old Trafford gjørdi Wayne Rooney skjótt av í dystinum móti Aston Villa. Bara 49 sekund vóru farin, tá Wayne Rooney legði heimaliðið á odda. Stutt fyri hálvleik økti sami Rooney eftir innlegg frá Nani. Darren Bent minkaði um munin í seinna hálvleiki, men Nemajna Vidic slerdi sigurin fastan fyri Manchester United við frálíkum máli.

Arsenal var aftanfyri tað mesta av dystinum móti Everton, men síðstu tjúgu minuttirnar vendu Arsène Wenger og hansara menn dystinum. Louis Saha legði Everton á odda um miðjan fyrra hálvleik, men tjúgu minuttir fyri tíð javnaði Andrey Arshavin og løtu seinni avgjørdi Laurent Koscielny við stútara.

Síðstu ferð, Chelsea og Sunderland møttust, vann Sunderland samførandi á Stamford Bridge. Chelsea hevði ikki bretska met-keyptið, Fernando Torres við, men tað megnaði allíkavæl at skora fýra ferðir á útivølli móti Sunderland. Chelsea vann dystin 4-2 eftir at hava verið aftanfyri 1-0. Málini hjá Chelsea skoraðu Frank Lampard, Salomon Kalou, John Terry og Nicolas Anelka, ið var heilt framúr í álopinum hjá teimum bláu.

Manchester United liggur fimm stig fremst, nú øll liðini hava spælt 24 dystir. Arsenal er næstfremst, meðan Machester City hevur níggju og Chelsea tiggju stig upp til oddasessin.

*trondur@sosialurin.fo*




*Við greiða 3-0 sigrinum á Drátti í gjárkvøldið styrkti Mjølnir sína støðu sum oddalið, samstundis sum liðið legði trýst á Fleyr og SÍ, ið renna aftaná*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Mjølnir trýstir Fleyr og SÍ

**FLOGBÓLTUR** Uttan tær stóru armsrørslurnar vunnu kvinnurnar hjá Mjølnir ein tryggan 3-0 sigur, tá Dráttur vitjaði í Klaksvík í gjárkvøldið. Harvið leggur oddaliðið trýst á næstu liðini á stigatalvuni, Fleyr og SÍ

Hilmar Jan Hansen

Spakuliga nærkast kappingin í Eikliguni hjá kvinnum endaspurtinum, og serliga millum tey fremstu liðini eru treytirnar harðar, tí hvør einasti dystur hevur týdning. Sum er, eru trý lið um boðið í kappingini um tvey finalupláss – Mjølnir við 14 stigum og Fleyr og SÍ við 11 stigum í part – so einki teirra hevur ráð at missa nakað sum helst.

Í gjárkvøldið hevði Mjølnir vitjan í Badmintonhøllini í Klaksvík, men gestirnir úr Drátti fingu ikki broytt tann veruleika, at Mjølnir er oddalið og Dráttur botnlið. Talan gjørdist um ein tryggan 3-0 sigur, ið styrkti støðuna hjá klaksvíkskvinnum á oddasessinum.

Dráttur royndi at muta eitt sindur ímóti í fyrsta setti og fylgdi við upp til 15, men so setti Mjølnir ferðina upp og tók settið. Hóast tær í Drátti royndu, hvat tær kundu, so munaði tað lítið, tí Mjølnir snøgt sagt var betri á øllum plássum og í løtum mestsum dusaði sær á vøllinum.

Í øðrum og triðja setti sluppu allir eykaspælararnir hjá Mjølnir upp í part, og framvegis var munur á liðunum, so tað sigur eisini eitt sindur um breiddina hjá oddaliðnum. Í triðja setti fór Mjølnir framum 11-3, men tá so Dráttur byrjaði at nærkast, fór heimaliðið aftur til sterkastu uppstilling og koyrdi sigurin heim.

Sostatt liggur trýstið nú á Fleyr og SÍ, ið hava spælt ein dyst minni enn Mjølnir, men eisini eru trý stig aftanfyri. Og hóast hesi bæði tykjast væl sterkari enn restin, so eru aftur bara trý stig niður til ÍF og fýra til TB, ið bæði eru lið, sum ein góðan dag kunnu spæla teimum ovaru eitt puss.

Óansæð, er lagt upp til ein spennandi endaspurt hjá kvinnunum, har tað í løtuni sær út til, at tað bara er ein spurningur um, hvat av hinum liðunum sleppur at spæla FM-finalur ímóti Mjølnir.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

**Mjølnir - Dráttur 3-0**
(25-20, 25-15, 25-18):